Landsprentsmiðjan

# FISKIRANNSÓKNIR

# I

JÁKUP SVERRI JOENSEN

## ROYNDARFISKISKAPUR EFTIR SILD VIÐ NÓT Í JANUAR—MARS 1966 VIÐ M.s SILDREKANUM

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN

TÓRSHAVN 1966

# FISKIRANNSÓKNIR

# I

JÁKUP SVERRI JOENSEN

ROYNDARFISKISKAPUR
EFTIR SILD VIÐ NÓT Í JANUAR—MARS 1966
VIÐ M.s SILDREKANUM

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN

TÓRSHAVN 1966

LANDSPRENTSMIÐJAN - TÓRSHAVN 1966

## Inngangur

Sum kunnugt byrjaði føroyska havsildaveiðan av álvara fyrst í 50-unum. Tey fyrstu árini varð bara veitt við gørnum, og at kalla øll veiðan varð saltað í tunnur umborð á skipunum. Bert nøkur fá skip, ið veiddu sild til agn, ísaðu hana í kassar. Øll tey fyrstu árini varð bara fiskað frá




1. mynd. Føroysk sildaveiða 1951—65.

juli til seinast í oktober ella fyrst í november. Nøkur av agnsildaskipunum byrjaðu tó í juni.

Í 1962 fekk fyrsta føroyska skipið kraftblokk og royndi við ringnót. Hetta skip var m.s Brestir hjá p.f Kimbil. Skipari var Júst í Túni. Árið eftir royndu 4 skip við ringnót og kraftblokki, í 1964 8 skip, í 1965 11, og í ár (1966) hava 16 skip kraftblokk.

Á 1. talvu sæst yvirlit yvir samlaðu føroysku sildaveiðuna í árunum 1951—1965. Tølini vísa vektina í tonsum umroknað til heila feska sild. Mesta av sildini, ið veidd

er undir Føroyum í hesum árum, er fiskað inni í fjarðunum, men tíverri verður ikki altíð givið upp, hvussu nógv fjarðasild er veidd, og eiga tí hesi tøl helst at vera eitt sindur størri. Annars sæst á talvuni, at nógv størsti parturin er veiddur á sildaleiðunum á Norðhavinum. 1. mynd

1. Talva. **Føroysk sildaveiða.**
Tons (fesk sild)

| Ár | Føroyar | Norðhavið | Norð-sjógvurin | Tilsamans | Skipatal |
|---|---|---|---|---|---|
| 1951 | — | 850 | — | 850 | 10 |
| 52 | — | 3.885 | — | 3.885 | 32 |
| 53 | 220 | 16.152 | 690 | 17.062 | 89 |
| 54 | 182 | 27.424 | — | 27.606 | 138 |
| 1955 | 175 | 12.940 | — | 13 115 | 98 |
| 56 | 703 | 22.966 | — | 23.669 | 125 |
| 57 | 788 | 16.246 | — | 17.034 | 114 |
| 58 | 1.917 | 15.771 | — | 17.688 | 96 |
| 59 | 690 | 13.005 | — | 13.695 | 97 |
| 1960 | 445 | 10.972 | — | 11.417 | 60 |
| 61 | 20 | 16.865 | — | 16.885 | 67 |
| 62 | 35 | 9.820 | — | 9.855 | 72 |
| 63 | 18 | 12.855 | — | 12.873 | 59 |
| 64 | — | 18.280 | 973 | 19.262 | 71 |
| 1965 | 202 | 31.007 | 3.612 | 34.821 | 61 |

vísir í kurvu føroysku sildaveiðuna tilsamans í árunum 1951— 1965. Vit síggja, at veiðan vaks skjótt tey fyrstu 4 árini. Men í árunum frá 1955 til 1962 var veiðan sum heild minkandi. Frá 1963 byrjar veiðan hjá nótaskipunum at gera um seg, og vit fáa aftur eina vaksandi sildaveiðu. Í 1965 var veiðan komin upp um 34.000 tons, og var hetta størsta sildaveiða higartil í einum ári.

Tey fyrstu tvey árini royndu nótaskipini um somu árstíð sum garnaskipini. Men í 1964 royndu tey til seinast í oktober norðanfyri og gjørdu so klárt at fara í Norðsjógvin at royna. Tey royndu so har til jólar. Í januar 1965 fóru tey aftur í Norðsjógvin og royndu har til mai—



juni, tá tey komu aftur hendavegin at royna norðan fyri Føroyar. Her fiskaðu tey so árið út. Bara eitt skip roy ndi í Norðsjónum í november og december.

Í november 1965 fekk landsstýrið bræv frá 8 feløgum, ið eiga nótaskip, við uppskoti um, at royndarfiskiskapur eftir sild skuldi fara fram undir Føroyum fyrst í 1966. Í brævinum var m. a. víst á, at tað er av alstórum týdningi, at ráevni fæst til sildaídnaðin so stóran part av árinum sum møguligt. Sum nevnt royndu føroysku skipini í Norðsjónum fyrstu 4—5 mánaðirnar av 1965. Menn roknaðu við, at tað sama fór at henda í 1966. Hildið var tí, at roynd átti at gerast at veiða sild um okkara leiðir hesa ársins tíð.

Seinastu árini eru gjørdar stórar millumlanda vísindaligar kanningar viðvíkjandi sild og sildagongd á Norðhavinum. Hesar kanningar byrjaðu í 1948. Tað árið kom Dana til Føroyar í juni mánaða við Vedel Tåning sum leiðara.

Her frætti hann, at einstøk føroysk skip høvdu fiskað sild norðan fyri Føroyar við gørnum. Vit fingu nakrar av hesum umborð á Danu og tóku tær við til Íslands til kanningar. Tað vísti seg at vera »íslandssildir«.

Íslendski fiskifrøðingurin Árni Fríðriksson var longu áðrenn kríggið av tí áskoðan, at sildin, ið íslendingar fiskaðu á Norðlandinum um summarið, var sama sildin, sum gýtti yviri við Noreg um veturin. Vedel Tåning hevði stóran áhuga fyri at kanna, um henda áskoðan Fríðrikssons var bein. Afturkomnir úr Eysturgrønlandi í august 1948 fóru vit við Danu norð um Ísland. Har lógu fleiri hundrað skip (mest snurparar) og bíðaðu eftir sildini, sum enn ikki var komin á Norðlandið í stórum mongdum. Dana silgdi víðari eystureftir og kannaði viðurskiftini á Norðhavinum og suður ímóti Føroyum. Væl av sild var at síggja, og fingu vit eisini sild í gørnum.

Henda kanningarferð gjørdi, at millumlanda samarbeiðið kom í lag. Tey fyrstu árini luttóku Danmark, Ísland og

Noreg. Tá Fiskirannsóknarstovan var sett á stovn, komu føroyingar upp í kanningarnar við Ternuni, og seinni luttóku eisini russar.

Úrslitið av hesum kanningum, saman við upplýsingum um hin praktiska fiskiskapin, var, at menn fingu góða hylling á lívssøguni hjá sildini. Um hetta er nógv skrivað, og skal tað tí ikki vera tikið upp aftur her. Bert skal nevnast eitt sindur um, hvussu sildin ferðast um okkara leiðir á vetri.

Vanliga stendur nógv sild einar 120—150 fjórðingar í útnyrðing úr Føroyum frá november til út í januar. Síðani flytir hon í ein lágan eystan, og um mánaðarskiftið januar —februar er hon vanliga bert 50—100 fj. í landnyrðing úr Fugloynni. Meðan høvuðsmongdin av sildini fer longur eystureftir og yvir til Noregs at gýta, hevur tað verið vanligt seinastu árini, at lítil partur skilir seg út og kemur inn á bankarnar eystan fyri Føroyar og gýtir her.

Russar hava tey seinastu 10 árini fiskað sild við gørnum undir Føroyum í februar—mars. Eisini føroyingar hava verið varir við sild á bankunum her hesi árini. T. d. royndi trolarin Kallsevni eftir upsa við troli nakrar dagar í mars 1962. Hann fekk væl av sild í trolið, hóast tað ikki var sildatrol, hann brúkti, og flestu sildirnar fóru tí ígjøgnum meskarnar. 2 ár seinni — í mars 1964 — varð fyrsta roynd gjørd at veiða sild við nót á bankunum undir Føroyum. Tað var Júst í Túni, ið gjørdi hesa roynd við m.s Bresti. Teir sóu væl av sild, men hon stóð ov djúpt til at kunna veiðast við nótini. Teir fingu bert nakrar fáar kurvar av sild.

Aftur í 1965 royndi Júst í Túni eftir sild undir Føroyum. Hesa ferð við sínum egna skipi, m.s Sildrekin. Royndin fór fram frá 24. februar til 17. mars. Úrslitið var ikki gott, bert 2 tons av sild. Tað var annars nakað at síggja, serliga ta fyrstu tíðina, men hon var stygg og gekk skjótt. Av tí at teir fingu ikki nógva fíggjarliga hjálp til royndina, var roynt eftir upsa við snellu fyri at gera



royndina bíligari. Hetta hevur ivaleyst tarnað royndina við nót.

Hesar royndir saman við vísindaligu kanningunum, ið gjørdar eru um okkara leiðir tey seinastu árini, gjørdu, at vit av fullum huga tóku undir við uppskotinum um at leiga skip til royndarfiskiskap eftir sild í januar—mars 1966, og mæltu vit tí landsstýrinum til at gera royndina. Eisini landsstýrið og fíggjarnevnd tóku væl undir við uppskotinum og útvegaðu pening til royndina. Úrslitið var so, at m.s Sildrekin hjá pf. Havsilvur varð leigaður í tíðarskeiðinum januar, februar og mars 1966. Skipari var Júst í Túni. Leiðari av royndini var Jákup Sverri Joensen.

**Dagbókin hjá Sildrekanum.**

*3. januar.*

Sildrekin kom til Havnar í morgun. Teir mynstraðu, 11 mans, kl. 14. Fóru av Havnini kl. 17.30. Vóru inni á Toftum eftir onkrum, ið gloymt var. Útaftur haðani beinan vegin, norð gjøgnum Djúpini.

Boðanes fór av Havnini nakað áðrenn okkum. Ísborg skuldi fara seinni. Ásur sigldi framman fyri okkum. Beinir er eisini á veg út.

*4. januar.*

Komu norð ímóti 64° N — 9° 30' V í lýsingini. Nakrir russar eru at síggja N og E av okkum. Ásur sigur seg síggja nakað av sild. Hann er staddur eystan fyri okkum. Beinir er NV av okkum, og Boðanes er vesturi á 11° V. Teir hava einki sæð. Ísborg er eystan fyri Føroyar, hevur leitað eystur av Sandoyar- og Fugloyarbanka. Hann hevur sæð nakað á 35 favna dýpi. Veðurmenninir hava lovað illveður av S og SE.

Um 14 tíðina sóu vit stórar torvur á 140—170 favna

dýpi. Vit krydsaðu suður- og eystureftir. Sildin kom uppeftir í skýmingini, upp til einar 50 favnar. Vindurin vaks nógv, so tað var ikki fiskiveður. Vit settu tí kós inn í Kallin.

*5. januar.*

Tað gekk seint inneftir. Tað var nógvur vindur av S. Fóru framm við Kallinum kl. 9.30. Tá var stormur. Komu á Klaksvík kl. 11. Ísborg liggur her eisini.

*6. januar.*

Liggja á Klaksvík. Hava rættað kumpass. Boðanes,Beinir og Kallsevni eru eisini komnir higar í dag. Vindurin er nógvur enn.

*7. januar.*

Fóru av Klaksvík kl. 10. Komu á Havnina kl. 12. Vóru á Runavík kl. 18.

*8. januar.*

Fóru úr Runavík kl. 10. Høvdu Kallin tvørs kl. 13. Stýrdu 350° mv. Tá vit høvdu siglt 69 fjórðingar, loddaðu vit á einari torvu frá 50 favna dýpi og niður eftir. Leitaðu aftur og fram har, sóu nakrar torvur. Sigldu ca. 6 fjórðingar longur norður við somu kós, og sóust eisini har einstakar torvur.

Síðan sigldu vit 10 fjórðingar í 45° mv. Tá sóu vit fleiri smærri torvur, tó í seinastuni eisini fleiri góðar. Tær flestu vóru frá 50 fvn. og niðari. Har lógu einir 10 russarar.

Grímur Kamban og Kallsevni vóru um somu leið sum vit, og teir vóru eisini varir við torvur. Boðanes var nakað norðvestari saman við nøkrum íslendingum, og hevði eisini hann sæð sild.

Tað vóru ongantíð líkindi at kasta, frískur vindur og tung alda, og tá ið hann spáddi vindmegi 8 av SE, fóru vit at sigla móti landi.



*9. januar.*

Kallurin var tvørs kl. 11. Bundu við kei í Runavík kl. 15.

*10. januar.*

Lógu í Runavík fyri veður.

*11. januar.*

Fóru úr Runavík kl. 14.30. Komu á Hvannasund kl. 19.

*12. januar.*

Fóru av Hvannasundi kl. 1.30. Høvdu Enniberg tvørs kl. 2. Kl. 5.55 vóru vit 40 fjórðingar 350° mv. úr Viðoy. Stýrdu somu kós, til vit vóru ca. 70 fjórðingar úr landi. Sigldu síðani ca. 7 fjórðingar í 45° mv. og so ca. 6 fjórðingar í 315° mv. Har var nakað av sild at síggja djúpt og væl av skipum. Tey flestu skipini vóru russisk og týsk. Vit sóu ein hála og tóku 10 stórar posar inn.

Kl. 12.30 fingu vit loranpositiónina 63° 37' N — 7° 47' V. Haðani leitaðu vit fyrst í 160° mv. og síðan í ymsar ættir, og sild var víða hvar. Hon kom uppeftir, tá tað skýmdi, men tað mesta stóð ov djúpt at kasta eftir.

Kl. 21 kastaðu vit á ca. 63° 40' N — 7° 40' V og fingu 30 tons. Náttina fyri fekk Kallsevni 100 tons í einum kasti um somu leið, og Beinir fekk 40 tons. Kl. 22 kastaði Kallsevni aftur og fekk 70 tons. Ásur fekk 25 tons í einum kasti á sama stað. Veðrið er av tí besta.

*13. januar.*

Á 63° 32' N — 7° 17' V ca. kl. 6 fekk Kallsevni 40 tons og fór at sigla inn. Ísborg fekk somuleiðis 40 tons har tá. Vit leitaðu á tí økinum, og fleiri torvur vóru at síggja, men allar vóru ov djúpt. Stórur russarafloti er á hesum leiðum nú.

Kl. 20 kastaðu vit á 63° 30' N — 7° 00' V og fingu 2 tons. Ísborg fekk tá 40 tons um somu leið. Kl. 20.30 kast-

aði Grímur Kamban har og fekk 40 tons. Kl. 22 kastaðu vit aftur har og fingu 10 tons. Fínasta veður.

*14. januar.*

Kastaðu kl. 2 á sama øki, men fingu einki. Kl. 3.30 fekk Grímur Kamban 30 tons har. Vit leitaðu ymsar vegir alla nátt, og fleiri góðar torvur sóust, men allar vóru ov djúpt. Kl. 15.40 sóu vit eina torvu frá 70 fvn. niður á 120 fvn. dýpi á 63° 35' N — 6° 50' V.

*15. januar.*

Kastaðu 5 ferðir í nátt og fingu 20 tons. Kl. 6.30 fekk Grímur Kamban 200 tons í einum kasti. Vit vóru staddir á ca. 63° 30' N — 6° 00' V.

*16. januar.*

Sunnunáttina kastaðu vit 4 ferðir og fingu 130 tons. Vóru staddir á 63° 24' N — 5° 50' V. Sigldu inn og komu á Gøtu kl. 16.30. Bæði lastin og dekkið eru full. Ongantíð hava teir havt so nógv í skipinum fyrr. Veðrið er av tí allarbesta.

*17. januar.*

Kl. 6 var liðugt at landa á Gøtu. Veiðan vá 210.860 kg. Fóru av Gøtu kl. 10. Høvdu Kallin tvørs kl. 12.

Beinir siglir inn við 200 tonsum, Ísborg við ca. 170 tonsum og Ásur við 240 tonsum. Ásur fer til Hirtshals at selja. Saturn fór út í gjárkvøldið, hann hevur ikki verið úti fyrr í ár. Boðanes er úti nú, hann hevur verið á beding í Vestmanna. Teir hava einki fingið í nátt. Teir eru staddir NE úr Fugloynni.

Komnir nakað norð um Kallin, vaks hann vindin, og av tí at veðurlíkindini eisini vóru vánalig, vendu vit og komu á Klaksvík kl. 15.30.



*18. januar.*

Reinsaðu nótina fyri sild, sum stóð í henni. Beinir fór av Havnini í morgun, hann fer til Hirtshals at selja.

Fóru av Klaksvík kl. 12.15 norð gjøgnum Haraldssund. Sigldu síðan í norðan. Kl. 17.30 sóu vit 2 stórar torvur á 68 fvn. dýpi. Kl. 18.30 sóust fleiri smærri torvur, tær ovastu á 45 fvn. dýpi. Leitaðu síðan eystureftir og sóu fleiri stórar torvur á 63° 10' N — 5° 00' V.

*19. januar.*

Leitaðu á somu leið sum 18. og sóu fleiri stórar torvur. Kastaðu eina ferð, men skræddu nótina og fóru at sigla inn kl. 22. 11 týskir trolarar fiska her við flottroli og fáa væl.

*20. januar.*

Komu á Runavík kl. 8.30; drógu nótina í land og bøttu allan dagin.

*21. januar.*

Bøttu nótina lidna og drógu hana so umborð aftur. Fóru av Runavík kl. 16.30. Høvdu Eystnes tvørs kl. 17. Kl. 20 var Fugloyggin tvørs um bakborð í avstandinum 4,5 fj. Loggið vísti 793 fj. Kósin var 45° mv.

*22. januar.*

Leitaðu allan dagin eystan úr Fugloynni. Kl. 3.20 sóust tvær torvur á 32—34 fvn. dýpi. Vóru tá staddir NE úr Fugloynni. Temp. var 7,1° C. Sigldu síðan í 100° mv. og sóu einstakar smáar torvur á 40—60 fvn. dýpi.

Kl. 6.20: Tvær stórar torvur á 40 fvn. Temp. var 6,3° C. Avstandurin úr Fugloynni var 41 fjórðingar.

Kl. 8: Ein stór torva á 60 fvn. dýpi 42 fj. úr Fugloynni.

*23. januar.*

Kl. 13 vóru vit 38 fj. NE til E úr Fugloynni og sigldu í mv. 90°. Kl. 15 sóust einstakar torvur á stórum dýpi.

Kl. 18.45 var positiónin 63° 07' N — 4° 40' V. Hitin var 5,2° C.

Kl. 19.30 var positiónin 63° 03' N — 4° 38' V Hitin var 6,1° C.

*24. januar.*

Fóru at sigla inn um náttina. Hann vaks vindin av vestri og gekk síðan til norðan. Komu á Havnina kl. 9 og fóru á Runavíkina seinnapartin.

*25. januar*

26., 27., 28. og 29 lógu vit á Runavík. Illveður var eystanfyri.

*30. januar.*

Kl. 14 fóru vit av Runavík norður á Hvannasund. Fóru haðani kl. 16.30. Kl. 17.15 høvdu vit Heltin tvørs um bakborð, kós mv. 135°.

*31. januar.*

Leitaðu út av Sandoyarbanka, men sóu einki. Um náttina var hann V—SV. Vit fóru at sigla inn og komu á Runavík kl. 7.30.

## *FEBRUAR*

*1. februar.*

Fóru av Runavík kl. 14. Høvdu Eystnes tvørs um bakborð kl. 14.45. Kósin var mv. 105°. Leitaðu alt kvøldið E av Sandoyarbanka og sóu fleiri torvur á 40—50 fvn. dýpi.



*2. februar.*

Hann vaks vindin um náttina til megi 7 av eystri. Vit sigldu inn og komu á Runavíkina kl. 13.30.

*3. februar.*

4., 5., og 6. lógu vit á Runavík. Illveður var eystanfyri.

*7. februar.*

Fóru av Runavík kl. 14.30. Høvdu Eystnes tvørs um bakborð kl. 15.15, kósin var mv. 115°. Leitaðu alt kvøldið eystur av Sandoyarbanka.

*8. februar.*

Leitaðu um náttina eystur av Nólsoyarbanka, men sóu lítið. Um morgunin vaks hann vindin eystaneftir, og vit sigldu inn. Komu á Runavík kl. 14.30.

*9. februar.*

Kl. 14: Runavík—Havnar.

Kl. 17.15: Av Havnini.

Kl. 17.45: Stongin tvørs um stýriborð. Kosin var 120° mv.

*10. februar.*

Leitaðu fyrst við Sandoyarbanka, men sóu einki. Hildu fram til Suðuroyarbanka. Sóu har nakrar torvur á 40—60 fvn. dýpi.

Um kvøldið var nakað av sild at síggja á 61° 10' N — 5° 15' V, og hon kom nakað upp. Kastaðu um ein stima kl. 18.30 og fingu 40 tons. Vit vóru ongantíð uppi yvir stimanum, men tað ovasta mundi vera 25 fvn. Kastaðu aftur kl. 23, men komu í stiman og tí ikki so væl fyri. Tað ovasta var á 30 fvn. dýpi. Fingu 10 tons. Tað er javnt stór sild. Magar vórðu drignir úr 100 sildum, og av hes-

um vóru 97 fullir av rogni og sili, men eingin er byrjað at gýta enn. 3 toskar høvdu sild, ikki sildarogn, í maganum. Temp.: 6,5° C.

*11. februar.*

Fóru at sigla inn kl. 1 og komu á Havnina kl. 7.15. Ísborg hevur roynt sama stað sum vit og fekk 70 tons, tá ið vit vóru farnir at sigla inn. Hava landað 49.190 kg. Fóru av Havnini kl. 14.15. Kl. 15 var Borðan tvørs um bakborð, kósin var mv. 160°. Veðrið var gott.

Høvdu ekkolodd og astic frá eftir Suðuroyarbanka, men einki var at síggja. Ísborg liggur um somu leið sum í gjár. Hon hevur sæð sild á 60—70 fvn. dýpi. Seinni kom tann sildin upp á 40. Teir kastaðu nú kl. 20 og fingu 5 tons.

Brestir hevur verið nakað norðari, men einki sæð. Hann er á veg higar. Kl. 20 sóu vit fleiri smærri stimar og kastaðu kl. 20.35. Fingu 5 tons. Komu beinan vegin aftur á ein stima og hava kastað um hann. Á loddinum sást hann millum 30 og 40 fvn. Veiðan var nakað tað sama sum seinast, kanska heldur størri.

Búgvin, ið roynir út av Sandoyarbanka, sigur, at sild er í longunum, teir fáa.

*12. februar.*

Kl. 00 kastaðu vit aftur á sama stað, dýpið er 130 fvn. Nótin kom føst í okkurt undir skipinum, og nakað av tíð gekk við at fáa leyst aftur. Vóru lidnir at taka inn kl. 3.30, fingu 7 tons.
Ísborg fekk 40 tons. Kl. 4 kastaðu vit aftur og fingu 5 tons. Morning Star hevur sæð sild nakað norðeystari.

Lógu og drivu allan fyrrapartin. Fóru at sigla eystureftir kl. 13. Komu í ein sildastima á 70—100 fvn. og løgdu stilt. Kastaðu kl. 19 á positiónini 61° 25' N — 4° 53' V. Vóru lidnir at hála kl 22. Fingu 160 tons. Fóru at sigla til lands.



Umframt okkum eru her: Brestir, Ísborg, Boðanes, Snæfugl (íslendskur) og ein stórur týskur hekkutrolari, sum roynir við flottroli. Brestir fekk 200 tons í einum kasti.

*13. februar.*

Landaðu 14 tons í Runavík fyrrapartin og 171 tons á Havnini seinnapartin. Sildin, ið landað varð í Havn, fór til fabrikkina á Velbastað fyri 22 oyru pr. kilo. Brestir landar á Tvøroyri.

*14. februar.*

Bøttu nót og tóku leiðið sundur á Runavík. Ísborg er farin at sigla til Hirtshals við 270 tonsum. Boðanes fekk 300 tons í einum kasti fyrrapartin. Brestir er farin útaftur, men skræddi aftur og fór inn.

*15. februar.*

Fóru úr Runavík kl. 11.30 til Havnar. Av Havnini kl. 13.30. Høvdu Borðina tvørs kl. 14.15. Kósin var SE.

Kastaðu kl. 22.30 SE av Suðuroyarbanka og fingu 7 tons. Snæfugl kastaði fleiri ferðir her. Boðanes er komin útaftur. Týski hekkutrolarin Altona roynir eisini her. Sildin, sum vit hava fingið her, er ikki búgvin enn. Boðanes hevur fingið 25 tons í dag.

*16. februar.*

Kastaðu á sama stað kl. 1 og fingu 5 tons. Tað vóru fleiri smáar torvur at síggja á 20—30 fvn. dýpi. Veðrið var gott, NE, 2.

Boðanes er innfarin fyri spælið. Brestir er komin útaftur og er her. Seinnapartin vaks hann vindin. Vit leitaðu norður móti Sandoyarbanka og sóu har nakrar torvur á 60 fvn. dýpi. Vendu so suðuraftur.

Snæfugl kastaði ikki, men rýmdi. Altona er her enn.

*17. februar.*

Um morgunin minkaði vindurin. Vit hava leitað NE yvir og suðuraftur, men lítið sæð. Brestir fekk eitt kast upp á 40 tons og fór inn. Vit kastaðu kl. 5 og fingu 1 tons. Tá tað bleiv ljóst, sóu vit fleiri stórar torvur á 60—70 fvn. dýpi. Kl. 10 kastaðu vit á 61° 25' N — 5° 10' V. Torvan stóð á 38 fvn. dýpi. Fingu einki. Boðanes er komin higar. 3—4 norskir bátar fiska upsa við gørnum á Sandoyarbanka og fáa væl.

Kl. 14 kastaðu vit á sama stað, men fingu heldur einki hesa ferð. Kastaðu aftur kl. 16.45 og fingu tá 80 tons, men nótin skræddist illa. Boðanes kastaði tætt hjá. Hann fekk eisini 80 tons. Veðrið var ikki gott, NE 4. Sigla inn á Tvøroyri at landa.

*18. februar.*

Komu á Drelnes kl. 3. Byrjaðu at landa kl. 8 og vóru lidnir kl. 12. Veiðan vá 93.590 kg. Fóru av Tvøroyri kl. 18 til Havnar og Runavíkar.

*19. februar.*

Lógu allan dagin á Runavík og bøttu nót.

*20. februar.*

Í Runavík.

*21. februar.*

Í Runavík og bøttu nót.

*22. februar.*

Lidnir at bøta seinnapartin.

*23. februar.*

Fóru úr Runavík kl. 9.30. Fóru vesturum og leitaðu vestur eftir Mykinestunguni. Síðan leitaðu vit á Skeiva-



banka og Stórutungu, men sóu einki. Fóru upp undir Suðuroynna um kvøldið. Veðrið var E 4—5.

Hinir kraftblokkabátarnir vóru 30 fj. E úr Sumbiarenda. Teir sóu væl av sild, men tað var ikki veður at kasta.

*24. februar.*

Vegna ring veðurlíkindi fóru vit inn aftur á Runavík og vóru har kl. 11.45.

*25. februar.*

Lógu í Runavík allan dagin vegna illveður eystanfyri.

*26. februar.*

Lógu á sama stað.

*27. februar.*

Í Runavík.

*28. februar.*

Fóru avstað kl. 9. Sigldu út eystanfyri og sóu ein stima norðalaga á Sandoyarbanka, men hann var ov djúpt at kasta eftir. 5 fj. eystur av bankanum sóu vit aftur ein stima, men tá ið vit skuldu kasta, fór hann niður. Vit fóru so á sunnara kant á Sandoyarbanka ca. 35 fj. úr Borðuni. Kastaðu kl. 21 og fingu 20 tons.

## *MARS*

*1. mars.*

Vóru á sama stað sum dagin fyri. Kastaðu tvær ferðir: kl. 1 og kl. 4 og fingu hvørja ferð 10 tons.

Hinir kraftblokkabátarnir vóru allir á sama stað sum vit og fingu frá 20 til 120 tons fyri náttina. Eisini sóust eini 10 russisk skip. Eitt av teimum fekk óføra væl av sild.

Seinnapartin vaks hann vindin av landsynningi. Komu á Runavík kl. 21 og landaðu har 13 tons.

*2. mars.*

Fóru av Runavíkini kl. 9 og sigldu til Havnar. Ætlaðu at landa í Havn, men Kallsevni lá og landaði, so ikki slapst til. Av Havnini kl. 12.30 út á Sandoyarbanka. Hini skipini vóru eisini har. Væl av sild var at síggja, men hon stóð ov djúpt. Tað var mánalýsi og tung alda. Seinni varð leitað norð á Nólsoyar- og Fugloyarbanka, men lítið og einki var at síggja. Einki skip fekk nakað.

*3. mars.*

Sildrekin kom inn á Havnina kl. 11. Heldur ikki í dag eydnaðist at sleppa av við sildina, tí Grímur Kamban lá og landaði. Hann landaði 100 tons. Vit fóru av Havnini kl. 12. Fyrst var farið út á Sandoyarbanka. Har lógu Saturn, Beinir og Ásur. Beinir hevði fingið 25 tons, Ásur og Saturn einki. Eitt russiskt móðurskip var eisini har.

Á sunnara kanti av bankanum var væl at síggja, men tað stóð ov djúpt. Vit kastaðu við eini snellu og fingu upsa og tvær sildir.

Kallsevni fekk um dagin 180 tons í einum kasti á Fugloyarbanka, 62° 30' N — 5° 18' V, so øll hini skipini fóru at sigla norðureftir. Grímur Kamban fekk 90 tons, Ísborg 50 tons og Brestir 25 tons. Vit fóru suður á Suðuroyarbanka. Har lá stórur russarafloti við gørnum. Har var nakað at síggja. Tað stóð heldur djúpt, men ovari enn á Sandoyarbanka. Vit kastaðu á 61° 34' N — 5° 43' V kl. 22.30 og fingu 30 tons. Torvan stóð á 38 fvn. dýpi. Fínasta veður.

*4. mars.*

Kl. 1.30 kastaðu vit aðru ferð. Tað var ein stór torva á 40 fvn. dýpi um somu leið, men vit fingu einki. Kastaðu 3. ferð kl. 6 og fingu 5 tons. Komu inn á Drelnes kl. 11, har vit landaðu 61.050 kg. Fóru útaftur kl. 17. Kastaðu á Suðuroyarbanka, 61° 26' N — 6° 15' V, kl. 19.45 og fingu 30 tons. Brestir fekk 80 tons í einum kasti á Fugloyarbanka, Ísborg fekk 5 tons og hinir einki.



Kastaðu aftur kl. 23, men fingu einki. Tað var bara væl at síggja, men tak gekk ov spjatt.

*5. mars.*

Um náttina vaks hann vindin av suðri. Vit fóru inn á Tvøroyri og vóru har kl. 8. Landaðu 28.310 kg á Drelnesi.

Fóru av Tvøroyri kl. 13.30. Sigldu út á Suðuroyarbankan. Ásur fekk her 200 tons í einum kasti. Hann siglir til Hirtshals við 300 tonsum. Kallsevni siglir til Hirtshals við 200 tonsum.

Vit kastaðu á 61° 23' N — 5° 49' V kl. 19.30 og fingu 8 tons. Fyri náttina fingu Beinir og Grímur Kamban hvør 100 tons, Brestir 60, Boðanes 40 og Saturn einki. Ísborg skræddi og fór inn.

*6. mars.*

Vit kastaðu aftur um somu leið kl. 5.30 og fingu 5 tons. Seinni sóu vit stóra torvu á 18 fvn. dýpi, men kastaðu ikki vegna ring veðurlíkindi. Vindurin vaks av SV. Sigla spakuliga aftur og fram.

*7. mars.*

Eru um somu leið. Um morgunin minkaði vindurin. Grímur Kamban siglir til Hirtshals við 200 tonsum, Brestir landar 160 tons í Havn, og Beinir landar 160 tons á Drelnesi.

Vit kastaðu aftur kl. 11 eftir stórari torvu, men hon gekk ov skjótt, og vit fingu einki. Saturn kastaði eftir tí somu torvuni og fekk 120 tons. Boðanes hevur eisini kastað her, hann fekk 20 tons.

Kastaðu aftur kl. 13, men fingu einki. Kl. 15 kastaðu vit 3. ferð, á 61° 23' N — 5° 45' V, og fingu hesa ferð 215 tons.

Fóru at sigla inn kl. 20 og vóru á Havnini kl. 1.

*8. mars.*

Beinir fekk 240 tons um náttina og siglir til Hirtshals. Sildrekin siglir til Noregs við veiðini.

*9. mars.*

Boðanes siglir til Hirtshals við 230 tonsum. Ísborg fer til Hirtshals við 200 tonsum. Brestir landar 190 tons í Føroyum. Kappin, sum fór út í gjár, fekk 60 tons og landar í Føroyum.

*10., 11., 12. og 13.* var illveður.

*14. mars.*

Fóru av Havnini kl. 20.35.

*15. mars.*

Sigldu 23 fj. SV til V úr Høvdanum út á 100 fvn. og leitaðu suður gjøgnum Stórutungu. Síðan fóru vit vestur við Skeivabanka út á endan og krydsaðu innaftur eftir bankanum. Sóu 2—3 góðar torvur 19 fj. úr Suðuroynni og 32 fj. úr Mykinesi. Tær stóðu á 30—40 fvn. dýpi.

Hitin omaná er 8,4° C og við botnin 7,8° C.

Kastaðu eina snellu í eina av torvunum og komu í upsa. Men dorgin slitnaði, so bert ein húkur var eftir. Royndu aftur og fingu 8 upsar á 8 húkum, 4 honir heilt útgýttar og 4 hannar, tó høvdu 2 væl av sili eftir. Grímur Kamban kastaði 20 fj. N—NE úr Fugloynni, men tað kom óklárt og skræddi. Brestir fekk 1 tons millum Nólsoyar- og Sandoyarbanka. Róland og Kúrberg hava roynt á vestara kanti



á Skeivabanka og fáa væl. Fesk sild kemur úr upsanum. Vit fóru at sigla móti teimum eftir middag. Dýpið er umleið 110 fvn. Her skrivar óført á loddinum, mest niðri við, men stundum uppi á 60—70 fvn. Nakað er helst upsi, men væl av sild man eisini vera.

Kastaðu í eina torvu og fingu 9 upsar á 11 húkum. Sild kom úr teimum. Kl. 14.15 fóru vit aftur at sigla móti torvunum, vit sóu í morgun, men hesa ferð var ógvuliga lítið at síggja.

Meðan veðrið var gott til nótakast fyrrapartin, var tað ivingarsamt aftan á kl. 20. Leitaðu alla tíðina á Skeivabanka, men sóu bert einkultar smáar torvur.

*16. mars.*

Hava leitað alla nátt aftur og fram á Skeivabanka, men uttan úrslit. Tað er nakað av vindi av útsynningi og ikki veður at kasta. Bátarnir hava leitað ógvuliga víða, men einki sæð.

Brestir hevur verið suður gjøgnum allan kantin vestan fyri Suðuroynna. Beinir hevur leitað norðuri á Mykinesgrunninum, men er komin aftur higar. Ísborg hevur leitað á øllum innara kanti á Sandoyarbanka, út gjøgnum sunnara kant, út eftir Suðuroyarbanka og suður av, har sildin var seinast. Síðan fóru teir inn vestureftir og vóru nú 17 fj. úr Sumbiarenda. Kappin er staddur NE úr Fugloynni. Saturn og Kallsevni eru staddir norðan fyri Fugloynna.

Av tí at veðrið ikki batnaði, fóru vit at sigla til lands móti kvøldi og løgdu at í Runavík kl. 20.45. Seinni fóru vit á Skála.

*17. mars.*

Fóru av Skála kl. 9.15 og vóru í Havn kl. 11.30. Farið varð avstað aftur kl. 12.

Vit leitaðu á Skeivabanka og fóru so út á Føroyabanka, men funnu ongastaðni nakað.

*18. mars.*

Leitaðu á innaru trom á Føroyabanka um náttina og fóru um morgunin innaftur á Skeivabanka, men ongastaðni var nakað at síggja.

Hann vaks vindin nógv fyrrapartin, og um 21 tíðina var illveður, so vit fóru inn.

Hóskvøldið, 17. mars, raktu hini nótaskipini við sild út av Sandoyarbanka á 61° 52' N — 5° 12' V. Ísborg fekk 200 tons, Boðanes 240, Ásur 210, Kallsevni 180, Brestir 165, Beinir 120, Saturn 100, Kappin 5 og Grímur Kamban 25 tons fyri náttina.

*19. mars.*

Lógu á Runavík allan dagin fyri veður.

*20. mars.*

Um 19.30 tíðina kom hann av útnyrðingi, og farið var til Havnar.

*21., 22., 23.* og *24. mars* lógu vit á Havnini fyri veður.

*25. mars.*

Fóru av Havnini kl. 14. Leitaðu út á Sandoyarbanka, norðeystureftir uttan fyri Nólsoyarbanka norður á 63° 00' N — 5° 00' V, har vit sóu eitt lítið sindur á ekkoloddinum.

*26. mars.*

Um morgunin vaks hann vindin, og á middegi var illveður, so vit fóru inn á Fuglafjørð.

*27. og 28. mars* lógu vit á Fuglafirði fyri veður.



*29. mars.*

Fóru av Fuglafirði kl. 9 og komu til Havnar kl. 12. Lógu har restina av degnum, meðan akselgeneratorurin, sum vit høvdu lænt Varðberg, varð úrtikin.

Grímur Kamban fekk stórt kast á sunnara kanti av Nólsoyarbanka um kvøldið, men nótin skrædnaði, og teir fingu bert 25 tons inn.

*30. mars.*

Vóru klárir at fara kl. 13. Sigldu út gjøgnum sunnara kant av Nólsoyarbanka. Tá ið vit vóru komnir 45 fj. út, frættu vit frá Kallsevni, at teir høvdu kastað á Sandoyarbanka á 61° 40' N — 5° 10' V. Vit fóru so hagar, men funnu bert 2 smáar torvur, sum stóðu á 60—70 fvn. dýpi. Kappin hevði fingið 100 tons, Brestir 50 og Kallsevni 40 tons á tí staðnum. Um kvøldið vaks hann vindin.

*31. mars.*

Kl. 2 var illveður, vindmegi 8 og kavarok, so vit fóru at sigla inn og komu á Havnina kl. 10.15.

### Úrslitið av royndini.

Sum sagt høvdu menn roknað við, at nótaskipini fóru í Norðsjógvin at royna aftan á nýttár 1966. Men, sum tað eisini sæst í dagbókini, varð tað ikki so. Umframt Sildrekan royndu 6 onnur føroysk skip norðan fyri Føroyar í januar. Teir fyrstu 10 dagarnar var ongantíð veður at kasta. Eisini stóð sildin djúpt. Síðani komu nakrir góðir dagar, og skipini fingu góða veiðu. Seinast í mánaðinum var aftur illveður. Samlaða veiðan í januar var 1568 tons. 2. mynd vísir, hvar skipini royndu í januar. Tølini merkja dato, krossarnir vísa leiðir, har sildatorvur eru sæddar, og

ringarnir vísa, hvar skip hava kastað og fingið sild. Tað sæst skilliga, at sildin hevur gingið í ein lágan eystan í januar.

Í februar fiskaðu 9 føroysk skip við nót. Av teimum royndu 5 undir Noreg tað mesta av mánaðinum. Samlaða veiðan henda mánaðin var 2.785 tons, harav 1.660 tons




2. mynd. Sildaleiðir í januar.

veidd eystan fyri Føroyar, serstakliga eystur av Suðuroyarbanka. Á 3. mynd sæst, hvar á leið skipini royndu og sóu sild í februar. Tøl, krossar og ringar merkja tað sama sum á 2. mynd.

Í mars fiskaðu 10 føroysk nótaskip, og øll royndu tey undir Føroyum. Samlaða veiðan í mars var 4.472 tons. 4. mynd vísir leiðirnar í mars. Tá var sildin komin inn á bankarnar. Mest var veitt á Suðuroyar- og Sandoyarbanka, men eisini á Fugloyar- og Nólsoyarbanka var fingið nakað. Umframt var sild eisini at síggja á Skeivabanka vest-



an fyri Suðuroynna, men hon stóð ov djúpt til at kunna veiðast við nót.

Samlaða veiðan hjá nótaskipunum hesar 3 mánaðirnar var 8.825 tons; harav vóru 7.700 tons veidd eystan fyri og norðan fyri Føroyar. Fyri hvønn mánaða sær var með-




3. mynd. Sildaleiðir í februar.

alveiðan undir Føroyum og norðanfyri upp á hvørt skip 224 tons í januar, 380 tons í februar og 447 tons í mars.

Fiskiskapurin var nógv tarnaður av ringum veðri, sum eisini má roknast við hesa ársins tíð. Umleið helvtina av tíðini var ikki roynandi fyri veður, og skip lógu inni. Nakrar dagar var eingin sild at síggja, og einstakar dagar stóð hon ov djúpt. Fleiri veiðidagar vórðu mistir, av tí at skip máttu fara uttanlands at avreiða. Og kom hetta av, at vit høvdu ikki nóg stór virkir á landi at taka ímóti sildini.

Tá samanum kemur, eru menn tó væl nøgdir við úrslitið av veiðuni. Vit hava nú á fyrsta sinni havt vetrafiskiskap eftir sild undir Føroyum og eru komnir eitt stórt stig nærri málinum, sum má vera: Sildafiskiskapur úr Føroyum alt árið.




4. mynd. Sildaleiðir í mars.

**Kanningar.**

At enda skal sigast eitt sindur um úrslitið av kanningunum av tí veiddu sildini. 5. mynd vísir aldurin. Mest er til av 59 og 60 árganginum ella 6 og 7 ára gamlar sildir. Sum eisini aðrar kanningar hava víst, eru hesir báðir ár-



gangir av Norðhavssildini sera góðir. Teir koma ivaleyst at hava stóran týdning fyri fiskiskapin nøkur ár enn.

Sildin gýtir á bankunum eystan fyri Føroyar, serliga á Suðuroyarbanka og Sandoyarbanka, á umleið 100 favna dýpi. Í 1966 byrjaði gýtingin so smátt fyrstu dagarnar av mars, men størsti parturin gýtti ikki, fyrrenn farið var




5. mynd. Aldurin á sildini.

um hálvan mars. Aftan á gýtingina rýmdi sildin aftur, helst mundi hon fara norðeftir.

Seinast í apríl og fyrst í mai í 1966 fekst væl av vársild á fleiri fjarðum og víkum, m. a. á Skálafjørðinum, Lambavík og Gøtuvík. Hetta var gýtandi sild, men tað er líkt til, at tað var ikki Norðhavssild. Her var nógv mest til av 60 og 61 árganginum. Tað er ilt at siga, hvaðani henda sildin kemur, men óvist er tað ikki, at hon kemur eystanifrá. Kanska kanningar í komandi árum koma at greiða henda spurning.